# Ongantíð panikkur í

**Tórbjørn Bech var umborð á Norðbúgvanum, sum hóskvøldið rendi í land uttanfyri Skansabryggjuna í Havn. – Tað var ongantíð panikkur í, sigur Tórbjørn. – Eg visti beinanvegin, hvønn veg báturin rak, so tað var bara at fyrireika meg upp á at hoppa í land**

ÓHAPP

*Ingrid Bjarnastein*



*Tá Norrøna skuldi avstað hóskvøldið, misti pressarin hjá Skipasmiðjuni Norðbúgvan hjá Óla Hammer, stjóra á Smyril Line. Báturin sakk á botn*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hóskvøldið rendi Norðbúgvin á land uttanfyri Skansabryggjuna í Havn, har hann sakk. Tórbjørn Bech, sum við Norðbúgvanum slapp óskaddur í land, men sami bátur sakk aftur løtu seinni, tá brandstøðin sleipaði hann inn, við molan.

Norðbúgvin er ein Awi 27 bátur, og hann hevði júst fingið nýggjan motor. Tórbjørn Bech var ein royndartúr við bátinum tá óhappið hendi.

– Motorurin koblaði úr, og so vildi hann ikki kobla í aftur, greiðir Tórbjørn Bech frá.

– Eg visti beinanvegin, hvat var hent, og hvønn veg báturin rak, so tað kom ongantíð panikkur í, men tað gekk skjótt fyri seg. Tað var bara at boða frá, at eg var uppsteðgaður og fyrireika meg upp á, at eg skuldi leypa í land.

Frá politistøðini í Havn verður upplýst, at klokkan 19.36 hóskvøldið komu boð frá MRCC Sjóbjargingarstøðini um, at ein bátur hevði rent á land. Upplýst var eisini, at ein maður var umborð, og sjúkrabilurin varð tí sendur oman á molan, sum ein trygd. Seinni funnu tey útav, at maðurin var umborð á Norrønu.

## Vandi

Báturin rak inn ímóti landi, og tá Norðbúgvin var komin nóg nær, leyp Tórbjørn á steinarnar á molanum. Men tað var hált, og tí gleið hann niður á sjógv.

– Eg slepp fínt upp á land. Men eg gleði ímillum. Eg royndi at halda ímóti, men tað var so hált, sigur Tórbjørn, sum leggur afturat, at sjálvandi er slíkt ikki stuttligt.

Seinni um kvøldið fóru menn frá Brandstøðini í Havn síðani at sleipa bátin inn um molan við pressaranum hjá Skipasmiðjuni. Tað gekk fínt inntil Norrøna skuldi avstað. Tá noyddist Norðbúgvin, sum Óli Hammer, stjóri á Smyril Line eigur, at steðga, og av tí, at tað súgaði so illa í sjónum, so slitnaðu endarnir og báturin sakk á botn.

Fríggjamorgunin fór brandstøðin so aftur út á molan fyri at fáa bátin upp.

Tá skuldi báturin bara fáast uppaftur og inn á molan, var upplýst av brandstøðini.



*Pressarin hjá Skipasmiðjuni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Tórbjørn Bech var við Norðbúgvanum meðan hann rak á land. Hann slapp tíbetur óskaddur frá hendingini*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



# Okkara uppgáva er at gera fiskin dýrari

**– Virksemið hjá Fofish er ikki tódnað, men tað er broytt, sigur Ábraham Løkin**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*

Í serblaðnum, Fiskur & Olja, søgdu vit í eini yvirskrift, at virksemið hjá fiskasølufelagnum, Fofish í Saltangará, er tódnað. Hetta bygdu vit á, at eitt av trimum feløgum, sum Fofish upprunaliga seldi fyri, nevniliga Snaraløkur, hevði tikið seg burtur úr samstarvinum. Eftir vóru so skipini hjá Olafi Olsen og Osmundi Justinussen.

Annar av monnunum aftanfyri Fofish, Ábraham Løkin, sigur, at Snaraløkur var so stutt við í samstarvinum, og tí er ikki rætt at siga, at virksemið er tódnað.

– Men tað er rætt, at virksemið hjá okkum er broytt nakað. Umframt at selja fyri skipini hjá Olafi og Osmundi, eru vit eisini farnir at selja svartkalva og djúpvatnsfiskasløg, eins og søla av feskum fløkum so smátt er vorðin ein partur av virkseminum.

Ábraham sigur, at umsetningurin hjá felagnum hevur hildið sær og hevur heldur verið vaksandi enn minkandi.



*–Tað hevur stóran samfelagsligan týdning, at rávøran hevur góðan prís, og tað er hetta, sum er málið við virkseminum hjá Fofish, sigur Ábraham Løkin.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Halda prísunum

– Okkara fremsta endamál er at selja fiskin hjá skipunum. Vit selja fyri provotión, og tí verður tað altíð okkara áhugi at selja fiskin so væl sum tilber.

Við í uppgávuni hjá Fofish er at hava neyvt samband við skip, virkir og uppboðssølu og leggja landingarnar til rættis, soleiðis at tær passa best inn í mynstrið – alt eftir, hvussu eftirspurningurin og marknaðurin eru.

– Tað er greitt, at eitt slíkt sølufelag er ikki líka væl sætt í eygunum á øllum, tí vit royna at gera okkara til, at rávøruprísirnir verða hildnir uppi, og tað ger jú, at fiskurin, sum virkini keypa, verður dýrari.

Ábraham vísir á, at okkurt av feløgunum, sum Fofish selir fyri, sigur seg ikki síggja tað soleiðis, at teir gjalda fyri at fáa fiskin seldan, tí virksemið hjá Fofish er við til at halda prísunum uppi.

– At so onnur skip, manningar og reiðaríir eisini fáa ágóðan av hesum, kann jú bara vera gott, leggur hann aftrat.

Sum felag, ið tekur sær av at selja ráfisk, liggur áhugin hjá Fofish á skipasíðuni, sjálvsagt.

## Knýta saman aftur

Ábraham Løkin sigur, at ábendingar eru um, at skip og virkir í størri mun enn seinastu árini, nú verða knýtt samanaftur.

– Vit síggja, at skip landa til somu virkir túr eftir túr og fáa tann prís, sum er á marknaðinum. Men onkur skal vera at halda marknaðarprísinum uppi, og tað gera ikki tey skip, sum á henda hátt knýta seg til virkini, leggur hann aftrat.

Fiskavirkini liva av muninum millum keyp og sølu - antin ráfiskaprísurin er høgur ella lágur.

– Vit halda tað hava stóran samfelagsligan týdning, at rávøran hevur góðan prís, og tað er hetta, sum er málið við virkseminum hjá Fofish, sigur Ábraham Løkin, sum saman við Leif Høj eigur felagið.

# Jólamenn vitja børn í Eysturoy

**Í dag steðga jólamenn í brandbilum við jólatrøini í øllum kommunum í Eysturoy**

JÓLATILTAK

*Vilmund Jacobsen*

Kunningarstovnurnar í Eysturoy ætla ikki, at desember mánaði skal fara fram við uttan, at øll børn í Eysturoy skulu hava havt møguleikan at síggja jólamannin - og eisini hava fingið okkurt gott frá honum.

Aftur í ár verður nevniliga skipað fyri serligum jólatiltaki í oynni, og hetta tiltak verður longu í dag, leygardagin 14. desember.

Jólamenn í tveimum brandbilum fara at koyra runt alla Eysturoynna og geva børnunum okkurt gott.

Annar brandbilurin byrjar byrjar á Strondum kl. 11 í morgun og hin í Oyndarfirði kl. 13.00. Koyrt verður, til jólamenninir hava vitjað í øllum kommunum í oynni, og seinasta vitjanin verður á Toftum kl. 17.30.

## Skráin

Brandbilarnir við jólamonnunum steðga við jólatrøini í ymisku kommununum.

Steðgirnir verða hesir (brandbilur 1): Strendur (11.00), Skáli (11.45), Oyrarbakki (12.45), Eiði (13.30), Gjógv (14.15), Funningur (15.00), Funningsfjørður (15.30), Runavík (16.30) og Toftir (17.30).

Brandbilur 2 steðgar soleiðis: Oyndarfjørður (13.00), Gøta (14.30), Leirvík (15.15) og Fuglafjørður (16.30).

*Tað verður stuttligt at vera barn í Eysturoy í dag. Jólamenninir eru í jólahýri og vitja við jólatrøini í hvørji kommunu.*

